KJAK

# Tjóðarflogfelag okkara má ikki líða somu lagnu



Annita á Fríðriksmørk

Vit stóðu saman um flogfelagið. Visjónir, vitan, førleiki og royndir. Alt gekk eftir fleiri ár upp í eina hægri eind.

Men so hendi nakað. Politiski myndugleikin helt bráddliga, at leiðslan mátti skiftast út og nýggj strategi leggjast.

Stjórin, sum ikki mátti verða føroyingur, spurdi fyritøku, sum heldur ikki mátti verða føroysk, um hvørja strategi, hann skuldi leggja fyri felagið..

Og vit bíðaðu. Kúrr. Ongin mutar ímóti.

Og so kom hon. Nýggja strategiin.

Og haldið tykkum fast: Nýggja strategiin lovar, at nú verður so nógv bíligari at flúgva og nýggjar destinatiónir fara at laga seg meira eftir føroyska tørvinum.

## Áðrenn og aftaná

Áðrenn nýggju strategiina hjá Atlantsflog fingu vit flogferðaseðlar fyri 950,-kr, um umbiðið varð minimum 25 dagar áðrenn fráferð - hetta kundi broytast móti kostnað.

Eftir nýggju strategiini fara vit at fáa flogferðaseðlar fyri 799,-kr, um umbiðið verður minimum 60 dagar áðrenn. Hetta kann IKKI broytast móti kostnað!

So nógv hóvasták fyri hasar hálvtannhundrað krónurnar, og enntá fyri verri treytir enn áðrenn.

Áðrenn var arbeiðsmálið føroyskt. Tað ber ikki til longur um leiðsla og nevnd, skulu skilja, hvat sagt verður.

Áðrenn flugu vit til tveir evuropeiskar metropolar: London og Milano. Nú skal London skiftast út við Aberdeen. Og Milano við Mallorca!

## Kalla tit hetta framstig?

Fólk hava undrast líka síðani november í fjør, hví tjóðarflogfelagið skuldi kollveltast.

Felagið byrjaði við eini nýggjari vinna, sum pionerar í føroyskari flogvinnu bygdu upp frá grundini. Har vórðu skapt hópin av arbeiðsplássum. Felagið setti Føroyar í miðdepilin við nýggjum farleiðum, endurnýggjaði seg við nútímans flogførum og var fremst við nýggjari navigatiónstøkni, sum hevur skapt munandi hægri regularitet í Føroyum – alt bygt á føroyskari grund.

Latið ikki Atlantsflog líða somu lagnu.

Góða samgonga, tit hava niðurlagað so nógvar fakliga væl kvalifiseraðar stovnar, meðan tit hava sitið hesi árini.

Eg rokni ikki við, at tit vilja nøkrum ilt, men eg vil halda uppá, at tit gera stóran skaða, við manglandi visjónum, og við politikki, sum er uttan mið og mál!

Stovnar, sum hava tikið fleiri áratíggju at bygt upp, hava tit latið farið fyri skeytið. Fyrst lótu tit persónligu upplýsingarnar fara av landinum. So niðurløgdu tit Landsbankan og tømdu búskapargrunnin og avtóku virðisbrævamarknað Føroya. So tiðnaðu tit blokkin og hækkaðu hann.

Vælsignan eigi tykkum latið ikki eisini føroyska stoltleikan fara úr Atlantsflog.

# Altíð lættari at flyta fokus

*Sjálvandi eiga framleiðsluøkini og tær havnir har fiskivinnan er at fáa ágóðan av avskipingargjøldunum, tá ið útflutt verður. At eg, enn einaferð, føri hetta fram, kann ikki koma óvart á formannin í Vinnunevnd Tórshavnar Býráðs*



Gunvá við Keldu
*Býráðslimur*
*Klaksvíkar Býráð*

Takkað verið fiskivinnuni, hava vit í dag eitt vælferðarsamfelag. Fiskivinnan hevur alla undanfarnu øld, heilt til dagin í dag, verið álitið. Vit hava átt og eiga framsøkin vinnulívsfólk, sum við dirvi og áræði hava skapt grundarlagið undir samfelagnum.

Havi áður verið inni á muninum og samstarvinum millum privata vinnulívið, sum gevur grundarlagið undir samfelagnum og almennu kørmunum, sum kommunurnar skapa. Hesi hanga neyvt saman bæði fíggjarliga og búskaparliga.

Fyrr var tað so, at vinnan og reiðarar sjálvir bygdu atløgubryggjurnar, so hvørt sum støddin av skipum kravdi hetta, og so hvørt sum fjarleiðirnar alt meiri gjørdust ein veruleiki. Sum árini eru liðin, hava vit sæð alt fleiri almenn gjøld og skattir verða lagt á bæði borgarar og vinnuna. Hetta hevur havt við sær, at land og kommunur enn meiri hava verið noydd at byggja havnir, so at størru skipini kundu leggja at fyri uppog avskipað fiskin.

## Havnaútbyggingar

Eftir kreppuna í 90'unum avtók Føroya Løgting landskassastuðulin sum viðførdi, at kommunurnar einsamallar máttu gjalda allar havnaútbyggingar. Hetta gjørdi, at kommunurnar enn meiri høvdu tørv á teimum inntøkum tær kundu fáa, fyri at megna at fáa havnaútbyggingar at hanga saman fíggjarliga.

Klaksvíkar Kommuna fær í dag havna- og uppskipingargjald av tí, sum fer um bryggjukantin, men týdningarmikið er eisini at fáa part av tí sum fiskaframleiðslan gevur, tað sum verður virkað á staðum og avskipað hiðani. Hetta er eitt mál sum fleiri ferðir hevur verið uppi at venda landspolitiskt, eins og í kommunalum høpi. Enn er onki komið burturúr.

Í dag fara so gott sum øll avskipingargjøld av allari framleiðslu í landinum í ein kassa, Tórshavnar Havn. Júst hetta er tað, eg haldi er ein skeiv skipan og orsøk fyri, at eg enn einaferð geri vart við hetta. Tað er millum annað hesin peningur, sum kemur frá øllum økjum í landinum, sum Tórshavnar Havn nú ger millionaíløgur við. Tí fari eg enn einaferð at heita á okkara landspolitikarar at taka hetta mál upp í álvara, hetta mál, sum má undra mangan føroying.

## Tilfeingisgjald

Tá ið Sjúrður Olsen í grein síni nevnir, at eitt nú Klaksvík er farin við landsins tilfeingi, har Tórshavn onki hevur fingið, er hetta at skeikla málið fullkomiliga.

At Klaksvík og onnur øki hava virkið vinnulív innan fiskivinnuna, er sanniliga ikki nakað vit hava fingið. Hetta er skapt við hørðum arbeiði, ígjøgnum mong ár í upp- og niðurgangstíðum, stórum innsatsi og váðafúsum íløgum, sum til tíðir hava svikið, men nú tíbetur eru til gagns fyri bæði land og fólk.

Vit síggja í dag, at tilfeingisgjaldið, sum høvuðsvinnan er áløgd at gjalda, verður tikið inn í landskassan frá økjunum og kemur hesin ágóði í ógvuliga lítlan mun aftur út til tey øki, sum hava skapt framburðin.

Fari at lata upp til Sjúrð Olsen at tosa um runublaking, men ynski tó at vísa á, við "at flyta fokus" og tosa um dýrtkeyptu íløgurnar í fiskivinnuna, sum nøkur ávís pláss hava notið gott av, tí tey vildu, og tí tey bardust fyri tí, verður so hansara sak.

Sjálvandi eiga økini, har framleiðslan er og fiskivinnan brúkar havnirnar, at fáa lut í avskipingargjøldunum, eins og vit í dag fáa ágóðan av innskipingargjøldunum.

**Vit síggja í dag, at tilfeingisgjaldið, sum høvuðsvinnan er áløgd at gjalda, verður tikið inn í landskassan frá økjunum og kemur hesin ágóði í ógvuliga lítlan mun aftur út til tey øki, sum hava skapt framburðin**

in.fo in.fo